# Skips Sosialurin
## - TÍÐINDI TIL SJÓFÓLK





**Nú er tað gjørligt hjá okkara sjófólki at fylgja við hvat hendir**

Fá ein heilan Sosial sum e-mail, hvørja ferð hann kemur út.

Henda útgáva er gjørd á ein slíkan hátt, at hon fyllir minst møguligt og tískil skjót at heinta niður. Hetta er gjørt við at grafikkurin er tikin burtur, so einans teksturin er eftir og síðani pakkaður niður. Blaðið er sjálvútpakkandi á telduni og verður lisið við browsara, umframt at møguleiki er fyri at skriva alt blaðið út.

Útgávan er serliga ætlað okkara sjófólki, ið hevur atgongd til e-mail umborð á skipinum.

Stuðlað Skips Sosialin hevur

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

*Undirritaði teknar seg sum haldara av Skips - Sosialinum og fái fyrsta mánaðin ókeypis*

Navn á skipi:
Kontakt pers.:
e-mail:
Undirskrift:

**Hava tygum spurningar í hesum sambandi ring 213982**
**ella e-mail:** *skipssosialurin@sosialurin.fo*

☐ *Tekst útgáva*
☐ *HTML útgava ( uttan útskrift )*
☐ *HTML útgáva ( við útskrift )*

Sosialurin



# ítróttur

Nr. 36 • fríggjadagur • 21. februar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo


# Rekordsáttmáli til B36

**Seinasta stjørnan í stjørnusetta B36-hópinum verður helst á búnanum. Líkt er nevnliga til, at Maersk verður nýggur høvuðsstuðul hjá B36 í eini avtalu, sum ivaleyst er tann størsta av sínum slag í Føroyum**

SPONSORAVTALA
*Jákup Mørk*

Eitt av feløgunum, sum enn ikki hevur boðað frá, hvør høvuðsstuðulin fyri komandi kappingarár verður, er B36. Tey bæði seinastu árini hevur tað annars verið telefyritøkan, Kall, sum hevur verið høvuðsstuðul, men í heyst samdust partarnir um, at tað samstarvið ikki varð longt á hesum sinni.



*Eftir øllum at døma flytir búmerkið hjá Maers pláss komandi ár. Danska flogfelagið verður helst nýggjur høvuðsstuðul hjá B36, og alt bendir á, at talan er um størsta sponsorsáttmálan, sum nakað føroyskt ítróttarfelag hevur fingið*

### Metsáttmáli

At B36 enn ikki hevur boðað frá, hvør verður nýggi høvuðsstuðulin, kemst tó neyvan av, at felagið ikki hevur havt samband við møguligar høvuðsstuðlar.

Eitt navn, sum aftur og aftur hevur verið at hoyrt, er at danska flogfelagið, Maersk, skal verða nýggjur høvuðsstuðul. Meðan Kall hevur átt sætið á bringuni hjá B36, hevur flogfelagið hildið til á brókunum, men nú skal búmerkið so eftir øllum at døma flytast longur upp.

Tíðindini verða heldur ikki minni sannlík av, at formaðurin í B36 í løtuni er staddur í Danmark. Men tá vit hósmorgunin fingu orðið á Kristian á Neystabø, var hann ikki so nógv fyri at siga, hvørt hetta var í ørindum fyri B36 ella í privatum ørindum. Spurdur beinleiðis, um hann var í Danmark fyri at undirskriva eina sponsoravtalu, segði Kristian á Neystabø, at tað var hann ikki.

- Vit fáa nýggjan høvuðssponsor fyri komandi ár í nærmastu framtíð. Nær tað verður, og hvør tað verður, fái eg ikki svara fyri, var einasta viðmerkingin, sum formaðurin hevur til hetta.

Álítandi keldur vita tó at siga, at talan verður um sáttmála millum Maersk og B36. Og verður hetta so, so er lítið at ivast í, at talan verður um størsta sponsorsáttmála, sum eitt føroyskt ítróttarfelag hevur fingið.

Tað tykist sera trupult at fáa nakað greitt boð um, akkurát hvussu stórt krónutalið í sáttmálanum er. Men greiðar ábendingar tykjast tó vera um, at árliga grundgjaldið í sáttmálanum fer at verða onkra staðni millum 300.000 og 500.000 kr. um árið. Og hartil skulu so leggjast tær bonusupphæddir, sum kunnu koma upp á tal, um stjørnusetti B36-hópruin røkkur somikið langt í lands- og steypakapping, sum vónirnar eru til.

# Vágamenn spæla í Restorff's

**Restorff's Bryggjarí og FS Vágar hava gjørt eina sindur øðrvísi sponsoravtalu, har fólkið í oynni beinleiðis kann vera við til at økja um stuðulsupphæddina**

SPONSORAVTALA
*Jákup Mørk*

Restorff's Bryggjarí og FS Vágar hava fyri komandi ár avtalu um, at bryggjaríið í Havnini verður høvuðsstuðul, nú vágamenn aftur fara at royna seg í bestu fótbóltsdeildini.

Í mun til vanligar sponsoravtalur, er talan tó um eina heldur serliga avtalu hesaferð.

### Hjálp til sjálvhjálp

Johan Mortensen, sum hevur marknaðarføringina á Restorff's Bryggjarí um hendi, váttar fyri Sosialinum, at sponsoravtala er gjørd. Hann leggur afturat, at avtalan er gjørd soleiðis, tað í veruleikanum ikki er nakað mark fyri, hvat FS Vágar kunnu fáa burturúr eini slíkari avtalu.

- Avtalan er gjørd soleiðis, at tað í veruleikanum er upp til vágafólk, hvussu nógvar stuðulskrónur fótbóltsfelag teirra fær í kassan. Eins og aðrar fyritøkur hava vit í ávísan mun verið við til at stuðla ítróttinum í oynni við eitt nú lýsingarskeltum kring vøllirnar, men tað man tó vera ivasamt, í hvønn mun hetta hevur nakra ávirkan á hugin hjá fólki at keypa okkara vøru.

- Nú gera vit so eina avtalu, har ítróttarfelagið í nógv størri mun verður ein aktivur viðleikari. Avtalan er nevnliga sett soleiðis saman, at fyri hvørja fløsku við okkara vørum, sum verður seld í Vágoynni, fær FS Vágar eina ávísa upphædd. Bæði tá talan er um sølu úr vanligum handlum, goymsluni hjá Restorff's og Einkarsølu landsins.

Johan sigur víðari, at á hendan hátt er talan um eitt slag av hjálp til sjálvhjálp hjá feløgunum. Hann vísur á, at frammanundan hevur Restorff's Bryggjarí eina líknandi avtalu við VB, og at hendan avtalan hevur givið teimum sera positivar royndir.

- Við at fáa ítróttarfeløgini við sum ein aktivan viðspælara, hava tey ein beinleiðis leiklut í marknaðarføring okkara, samstundis sum tey hjálpa sær sjálvum at vinna fleiri stuðulskrónur, so fyri okkum at síggja, eru bara vinnarar í eini slíkari kontstruktión, sigur Johan Mortensen at enda.

# Nú er Óli í Kina

**Føroyski landsliðsskiparin er til royndarvenjingar í Kina, nú landsliðsfelagarnir venja í Malaga**

YRKISFÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í seinasta leygardagsblaðnum nevndu vit í grein um landsliðsúttøkuna, at Óli Johannesen hevði givið avboð til ferðina til Malaga.

Orsøkin til hetta var óviss, men óváttað leysatíðindi vóru tó at hoyra um, at Óli allar helst skuldi til Kina at royndarvenja.

Nú kann staðfestast, at hald var í hesum tíðindum. Romel Vokailo, sum umvegis svenska Glenn Schiller er umboðsmaður hjá Óla Johannesen váttar nú fyri Sosialinum, at Óli Johannesen í løtuni er í Kina, har hann skal royna at fáa sáttmála.

Spurdur um støðið í kinverskum fótbólti sigur Romel, at hetta er støðugt hækkandi.

- Fótbóltur er ikki tað, sum hevur havt størsta fólksliga áhugan í Kina, men hetta er nú um at broytast. Undirtøkan fyri ítróttini er nú vorðin somikið stór, at vinnulívið av álvara er farið inn í verkætlanir, og í dag er talan um munandi peningaupphæddir í kinversku deildunum, eins og kinverskar fyritøkur eisini royna at keypa seg inn í feløg ymsa satðni í Europa.

Romel Vokailo er annars sami maður, sum á sinni sendi Christian Høgna Jacobsen til royndarvenjingar í Portugal, har føroyski landsliðsleikarin tó breyt sær beinið. Um vánirnar hjá Óla fyri at fáa sáttmála, sigur hann, at tær sum heild eru góðar.

- Óli hevur nú eina viku at prógva, at hann er rætti maðurin, og hildu vit ikki, at hann hevði møguleikan, so høvdu vit so ikki sent hann yvir. Eg ivist ikki í, at fær Óli rætta stríðsviljan inn í venjingarnar hjá sær, so hevur hann góðan møguleika at standa seg. Tað er millum annað tað, sum er stóra styrkin hjá Óla, og tað eru jú styrkirnar hjá sær, sum hann fyrst og fremst skal vísa fyri kinverjum, sigur Romel Vokailo at enda.